# Stjørnan hátíðarhelt meistaraskapin

*Nógv varð gjørt burtur úr, tá Stjørnan spældi seinasta dystin í kappingarárinum. Dystin vann Stjørnan lættliga og so var lagt upp til veruliga gullveitslu*

EyÐun Klakstein

Stjørnan-Tjaldur 38-23 (22-9)

Tað var meira rómi enn hondbóltur, tá kvinnurnar hjá Stjørnuni leygardagin staðfestu, at tær hava besta kvinnuliðið í landinum.

Undan dystinum móti einum veingjarbrotnum Tjaldri var avgerðin um gullið langt síðani fallin, og tí var meira lagt upp til at hátíðarhalda meistarskapin.

Stjørnan hevur í vetur verið nógv tað besta liðið í kvinnudeildini og longu fyri fleiri vikum síðani var tað greitt, at Stjørnan vann gullið í ár.

Seinasti dysturin á árinum var spældur á heimavølli í KÍ-høllini, og har høvdu nógv fólk leitað sær seinnapartin leygardagin.

### Hátíðarhaldið

Nógv varð gjørt burtur úr. Klaksvíkar Hornorkestur spældi undan dystinum og í hálvleikinum, og Jógvan við Keldu, býráðsformaður, helt røðu áðrenn dystin.

Bakaríið hjá Símun hevði gjørt serligar lágkøkur til dagin, og eftir dystinum vórðu áskoðararnir bjóðaðir til kaffi og køkur. Børnini fingu góðgæti og sodavatn.

Tá dysturin varð bríksladur av varð hol sett á hátíðarhaldið. Nevndin í Stjørnuni hevði havt góðar stundir at fyrireikað undirhald, og tað høvdu teir eisini gjørt sær dælt av.

Ein nýggjur Stjørnusangur, sum Niclas Heri Jákupsson úr Dynamitt hevur skrivað, varð avdúkaður, og fólk frá Kulu Rótunum sungu tveir sangir.

Umboðið fyri Hondbóltssambandið Petur Ovi Petersen, helt røðu fyri meistarunum, og Karl Birgir Isaksen, sum er stjóri fyri høvuðsstuðulin hjá Stjørnuni, handaði spælarunum heiðursmerkini.

### Dysturin

Dysturin var ikki tað stóra upplivilsið. Tjaldri var ikkiført fyri at geva Stjørnuni nakra veruliga mótstøðu, og tá heimaliðið hevði vunnið sær avgerandi fyrimun í fyrra hálvleiki, tóku tær sær av løttum í seinna hálvleiki, sum var merktur av nógv mistøkum.

Móti endanum av dystinum royndu Stjørnuspælararnir ymiskt, og annar av málverjunum, Johanna Mikkelsen, skoraði eitt mál. Hin málverjin, Rannvá Andreasen, brendi sítt brotskast, tá hon fekk kjansin.



Kvinnurnar hjá Stjørnuni eru føroyameistarar ár 2000. Mynd: JH

Onkrar detaljur vóru, men tær fóru fáa, og eftir at Joan Midjord Joensen hevði gjørt besta málið í dystinum seint í fyrra hálvleiki, var ikki so nógv at fáa við.

Men Stjørnan hevur gjøgnum alla kappingina annars víst gott og støðugt spæl, og tað hevur ferð eftir ferð verið sjón fyri søgn, at kropsliga venjingarstøðan hjá spælarunum hevur verið gott grundarlag undir kvikum og uppfinsama spælinum hjá liðnum.

### Fegnaðist

Eftir dystin helt Petur Ovi Petersen frá HSF stutta røðu fyri Stjørnukvinnunum, og hann segði seg fegnast um, at meistaraskapurin var komin til Klaksvíkar, tí tað var gott fyri útbreiðsluna av hondbóltsspælinum.

– Vónandi fáa tit eisini nakrar fleiri menn at spæla hondbólt, segði Petur Ovi Petersen.

Meðan Stjørnan ikki hevur havt manslið í bestu deildini í nógv ár, hava Stjørnukvinnurnar ferð eftir ferð blandað seg uppí meistarastríðið, og í ár eydnaðist tað fyri fyrstu ferð síðani 1977 at vinna gullið.

Leygarkvøldið hevði Stjørnan veitslu í Tekniska skúla, og skipað varð fyri bæði gospelkonsert og dansi í KÍ-høllini.

Spælandi venjarin hjá Stjørnuni, Vesna Tomajek, og vongspælarin Adrijana Milodanovic fara nú heim til Jugoslavia at halda frí í eina tíð. Men ætlanin er, at tær verða aftur í Klaksvík í juli ella august mánaði.



*Fegnir spælarar og venjarar. Mynd: JH*

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
Stjørnan: Anna K. Samson 8 (1), Joan M. Joensen 7, Simona Hansen 6, Sólvá Eystberg 4 (1), Annika Ljósstein 4, Ragna Andreasen 4, Vesna Tomajek 2, Johanna Mikkelsen 1 (1), Andrijana Milocanovic 1, Jastrid Gullaksen 1
Tjaldur: Sunrid Gleðisheygg 7 (1), Sonja Gleðisheygg 5, Heidi Jacobsen 3, Oddvá Fossdalsá 2, Mona Langgaard 1, Kristine Ellingsgaard 1, Elinbjørg Hammer 1, Beinta Joensen 1
**Brotskøst:**
Stjørnan 7, Tjaldur 1
**Útvísingar:**
Stjørnan 1
**Dómarar úr Kyndli:**
Rúni Mohr og Høgni Vilhelmsen

# Hoyvíkingar fram um kollfirðingar

*H71 vann seinasta dystin á árinum, og við sigrinum tóku teir seg upp á fimta plássið, eitt stig framman fyri KÍF*

Jákup Mørk

Tjaldur-H71 18-20 (8-11)

Sum so hevði dysturin leygardagin millum omanfyrinevndu liðini ikki tann stóra týdningin. Einasti spurningurin mundi vera, um tað skuldi eydnast hoyvíkingunum at vinna seg fram um KÍF á stigatalvuni, ella um Tjaldur loksins skuldi fáa ein sigur í endaspælinum.

### Ongantíð í vanda

Hetta eydnaðist sum kunnugt ikki hjá Tjaldrinum, og hóast teir móti endanum av dystinum vóru um at fáa fatur á H71, so mundi sigurin hjá útiliðnum ongantíð av álvara vera í vanda.

Hoyvíkingarnir løgdu seg nevnliga á odda alt fyri eitt, og hesa leiðsluna hildu teir fast um allan dystin.

Í fyrra hálvleiki var munurin onkuntíð bert tað eina málið, men tá H71 tók seg trý mál fram um Tjaldrið móti endanum av fyrra hálvleiki, tóktist tað sum um dysturin var avgjørdur.

Seinna umfarið útbygdu gestirnir leiðsluna, og tá tíggju minuttir vóru eftir at leika, vóru fimm mál á muni millum partarnar. Seinastu løtuna fingu runavíkingarnir so høvið at pynta um úrslitið, men hóast teir tá fingu minkað munin niður í eitt mál, so var tað ov seint at koma við nakrari bjargingarætlan.

### Munurin er stórur

Hóast tað við tapinum enn einaferð varð staðfest, at Tjaldur eigur niðasta sessin í deildini, so merkir heta tó ikki, at talan verður um nakra niðurflyting fyri teirra viðkomandi.

Einasta liðið, sum kundi flyta upp úr aðru deild er Stjørnan, men mannfólkini í Klaksvík hava langt eftir á mál, um teir hava ætlanir um at endurtaka bragdið hjá kvinnuliðnum har norðuri.

Røddir hava eisini verið frammi um, at tað kanska hevði verið betri, um tað bert vóru seks lið í best mansdeildini. Hvørt hetta er rætta leiðin at fara, eru tó fleiri hugsanir um, men í øllum førum hevur kappingin í ár staðfest, at tað er rættuliga stórur munur ímillum toppin og botnin í føroyskum hondbólti.

Í løtuni hoyra Tjaldur og H71 til seinna nevnda bólkin, men møguleiki er fyri, at hetta fer at broytast um nøkur ár. Runavíkingar hava í øllum førum sett á stovn eitt miðvíst ungdómsarbeiði, sum vónandi kann bera ávøkst komandi árini.

Hoyvíkingar hava fyrr verið at sæð nakað ovarligari á stigatalvuni, men skal hetta eydnast teimum koamdni árini, er helst neyðugt at styrkja liðið við fremmandum leikarum. Hondbólturin í Hoyvíkini man tó hava eina ljósa framtíð, tí komandi ár verður nýggja høllin eftir ætlan tikin í nýtslu, og hetta fer uttan iva at skumpa undir menningina av hondbóltinum har á leiðini.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
Tjaldur: Sverri Justinussen 8 (4), Kári Hansen 3, Ragnar Olsen 2, Arnfinn Langgaard 2, Dánjal Hansen 2, Áki M. Hansen
H71: Eyðun Højgaard 8 (5), Halgir Dahl Olesen 5, Olaf Vestergaard 3, Tróndur Vatnhamar 2, Bárður Brimvík 1, Rene Dahl Olesen 1
**Brotskøst:**
Tjaldur 4, H71 5
**Útísingar:**
Tjaldur 1, H71 1
**Dómrar úr Neistanum/ H71:**
Kristian Johansen/Kristian Martin Skála





*Jákup Mikkelsen og Herfølge høvdu í gjárkvøldið møguleikan at økja um leiðsluna í superliguni*

# Brøndby hálvsnávaði

*Superligan: Eingin føroyingur var á vøllinum sunnudagin*

Hvørki Óli Johannesen í AGF ella Todi Jónsson í FCK vóru á vøllinum sunnudagin, tá hesi bæði føroysku liðini í superliguni taptu. Óli Johannesen tykist hava torført at endurvinna plássið á besta liðnum í Århus, sum hevur keypt fleiri verjuspælarar í vetur. Og vøddaskaðin, sum Todi Jónsson hevur verið darvaður av síðstu vikurnar, helt enn eina ferð føroyinginum í FCK burtur frá, har tað gongur fyri seg.

Vit hava skilt á lagnum, at tað kanska hevði borið til hjá Toda at spælt, og tað hevði leiðslan í felagnum ógvuliga fegin vilja, at hann gjørdi. Men læknarnir hava higartil hildið, at tað ikki hevur verið ráðiligt at spæla. Í hesi vikuni kemur Silkeborg, sum sunnudagin vann á heimavølli móti FCK, til Keypmannahavnar at spæla móti FCK í steypakappingini, og tað er stórt sannlíki fyri, at Todi fer at fáa møguleikan í tí dystinum.

### Herfølge góð kort

Jákup Mikkelsen hevði frí sunnudagin. Hann sat heima og fylgdi við í, hvussu tað gekk hjá kappingarneytunum hjá Herfølge. Tað er einki at siga til, at lagið var gott í Herfølge í gjár, tá teir hittust at fyrireika seg til heimadystin móti Viborg. Hesin dysturin varð spældur klokkan seks føroyska tíð. Vit fara at frætta úr Herfølge í morgin.

At lagið var gott í Herfølge komst av, at Brøndby, sum hevur verið mett sum besta boðið upp á meistaraskapin, bara fekk 1–1 í Vejle. Næstsíðsta sunnudag móti Lyngby var Brøndby aftanfyri 2–0, tá tíðin var um at vera farin, men tað eydnaðist teimum at javna í síðstu løtu. Hesa ferð var Brøndby aftanfyri 1–0 frá 3. minutti og inntil tíðina, sum dómarin hevði lagt afturat. Tá javnaði Peter Graulund, sum er fyrrverandi Vejle spælari.

Í Brøndby fegnaðust teir sjálvsagt um, at tað eydnaðist at javna, men tað er einki at siga til, at fagnaðurin ikki var heilhjartaður. Í staðin fyri seks stig í tveimum umførum hevur Brøndby fingið tvey stig, og um Jákup Mikkelsen og teir í gjárkvøldið fingu stig, so styrktu teir um sína oddastøðu. Tað eru ellivu dystir inntil superligan sunnudagin 28. mai verður liðugt spæld, og nú eru tey fleiri, enn tey vóru fyri einum mánað síðani, ið rokna Herfølge sum besta boðið upp á meistaraskapin.

### FCK verri fyri

Felagið hjá Toda Jónsson hevði í 2. hálvleiki allar møguleikar at fáa øll stigini í Silkeborg, men teir heilkiksaðu. Silkeborg fekk eitt reytt kort, tá 56 minuttir vóru farnir, og teir vóru á odda 1–0. Smáar tíggju minuttir seinni javnaði verjuspælarin Kofi Dakinah, og so tóktist spurningurin vera, um Silkeborg fór at megna at halda tørn um javnleikin, ella um FCK fór at fáa eitt ella fleiri mál.

Benny Johansen hevur áður verið venjari hjá FCK, sum hann hevur vunnið DM við. Nú er hann venjari hjá Silkeborg, og hjálparvenjarin hjá honum hevur í mong ár verið í KB og FCK.

Sjálvandi fegnaðust teir báðir um, at tað eydnaðist undirmannaða Silkeborg at skora sigursmálið tríggjar minuttir undan leikloki. Málið ørkymlaði FCK spælararnar nógv, og Thomas Rytter sá reyðakortið í evstu løtu.

Silkeborg er nú á fjórða plássinum. At FCK hóast tapið framvegis hevur møguleika fyri at røkka altjóða luttøku kemst av, at hini liðini eru ófør at taka stig frá hvørjum øðrum.

### AGF undir trýsti

Lyngby, sum vann 3–0 á AGF, er nú næstfremst. Liðið hjá Óla Johannesen hevði ikki nógv av bjóða uppá. Tá støðan var 3–0 fingu teir brotsspark, men Johnny Mølby misbrúkti gylta møguleikan.

At Vejle og Esbjerg, sum eru niðanfyri niðurflytingarstrikuna, fingu stig ger, at trýstið á AGF øktist.

Esbjerg megnaði málleysan javnleik móti meistaraliðnum úr Aalborg, sum hevur havt sera soltna úrtøku síðani vetrarstegðin. OB, sum eisini hevur verið mett millum niðurflytingar evnini, fekk aftur hesa ferð stig. Men hesa ferð vóru teir hepnir á heimavølli at javna til 1–1 móti AB. **jh**

**Støðan, danska superligan**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Herfølge | 21 | 12 | - | 4 | - | 5 | 35 | 28 | 7 | 40 |
| 2 | Brøndby | 22 | 10 | - | 6 | - | 6 | 38 | 26 | 12 | 36 |
| 3 | Lyngby | 22 | 11 | - | 3 | - | 8 | 36 | 30 | 6 | 36 |
| 4 | Silkeborg | 22 | 9 | - | 7 | - | 6 | 38 | 22 | 16 | 34 |
| 5 | AB | 22 | 9 | - | 7 | - | 6 | 34 | 27 | 7 | 34 |
| 6 | Viborg | 21 | 9 | - | 5 | - | 7 | 29 | 29 | 0 | 32 |
| 7 | AaB | 22 | 7 | - | 10 | - | 5 | 32 | 25 | 7 | 31 |
| 8 | FCK | 22 | 8 | - | 4 | - | 10 | 28 | 23 | 5 | 28 |
| 9 | OB | 22 | 5 | - | 9 | - | 8 | 19 | 28 | -9 | 24 |
| 10 | AGF | 22 | 5 | - | 6 | - | 11 | 20 | 35 | -15 | 21 |
| 11 | Esbjerg | 22 | 6 | - | 3 | - | 13 | 23 | 39 | -16 | 21 |
| 12 | Vejle | 22 | 3 | - | 10 | - | 9 | 24 | 45 | -21 | 19 |

# Nú er Vagnur glaður

Nú er rómur á Neistamonnum og -kvinnum, og hava tey tað so sanniliga uppiborið. At miðvíst arbeiðið ber ávøkstur, er ein gleði í sær sjálvum, men tá arbeiðið endar við einum føroyameistaraheitið, tá ið tit eiga virðingina hjá øllum.

Tað eru mong, sum gleðast saman við tykkum um hetta megnar úrslit – eisini mótstøðumenn tykkara á vølli.

Tað gleðir meg, at tit eru glað. Serliga gleðir tað meg,at nú er Vagnur Michelsen glaður. Hann er ein av eldsálunum í føroyska ítróttarheiminum, har Neistin enn gevur brand til uppvaksandi ættarlið.

Hetta hevur verið eitt spennandi ár innan hondbóltin, og hava teir báðir, Suni Merkistein og Finnur Helmsdal, duga serstakliga væl at givið okkum spenningin út gjøgnum útvarpstólið. Takk fyri tað, tit báðir.

Vit fegnast eisini um, at kvinnurnar hjá Stjørnuni nú aftur hava vunnið FM. Tað hava tær sanniliga uppiborið.

**Við ítróttarkvøðu**
**Henry Jarnskor**

# Kavin argar fótbóltin

*Løgmanssteypið: Enn er tað ikki avrátt, nær teir seks útsettu dystirnir skulu avgreiðast*

Higartil í ár hava fótbóltsvenjarar og spælarar fegnast um, at tað hevur borið til at vant, uttan til kavin hevur gjørt ónáðir. Men í vikuskiftinum turkaði kavafonnin tárini, hvíttaði línið og legði sína køldu hond á kappingina um løgmanssteypið.

Kavin var so mikið nógvur, at allir seks dystirnir í kappingini um vórðu avlýstir.

Eingin avgerð er enn tikin um, nær útsettu dystirnir skulu spælast. Tað er kanska torført at taka nakra avgerð, tá tað ikki er greitt, hvussu leingi kavin verður liggjandi.

Sambært skránni áttu hesir dystir at verið spældir í vikuskiftinum: Sumba–KÍ, VB–NSÍ, B36–B71, ÍF–B68, GÍ–HB og TB–FS Vágar. Teir tríggjar dystirnar í Suðuroy ber tað ikki til at avgreiða mitt í viku. Hinar tríggjar dystirnar hevði tað ivaleyst borið til at spælt mitt í viku.

Sum sagt so er einki avgjørt, men vit kundu ímynda okkum, at smávegis broytingar kundu borið við sær, at útsettu dystirnir kundu fingist frá hondini, soleiðis at bólkaumfarið verður liðugt spælt páskaaftan. NSÍ og KÍ skuldu bæði spælt í Suðuroy í vikuskiftinum. Hesi liðini skulu sambært skránni hittast í Runavík komandi sunnudag samstundis sum Sumba og VB skulu spæla í Sumba. Ein møguleiki er, at KÍ og NSÍ komandi leygardag fara til Suðuroyar, og at dystirnir millum NSÍ og KÍ og Sumba og VB verða avgreiddir mitt í viku.

Men nú fáa vit at síggja, hvussu leingi kavin verður liggjandi, og hvat FSF fer at spæla út við.

**jh**

STEYP OG HEIÐURSTEKIN

Vit hava Føroya størsta úrval av steypum og heiðursteknum.



Vit gravera (næstan) alt:

- El-talvur
- Skipstalvur
- Búmerkir
- Navnaskeltir
- Termokannur
- Pennar o.a.

3arin
UR GULL SILVUR
FOTO & VIDEO
FLØGUR

SMS · Tel 35 35 35 · Fax 35 35 36
E-mail: tryarin@post.olivant.fo

SANSIR · TEL 355 355